UPPTAKT TIL FÓTBÓLTIN s. 13-14

tíðindablaðið sosialurin

7,-

Nr. 157 ★ leygardagur/sunnudagur
21./22. august 1993

Postfelagið

# Bjargar 29 størvum

Postleiðslan ætlaði at siga 47 fólkum upp, men landsstýrið lurtaði meira eftir Postfelagnum. Síða 8

*Johan Mortensen, nevndarlimur í Føroya Oljuídnaður:*

Síða 9

# Olja ella kaos



-Taka vit ikki avleiðingarnar av støðuni í samfelagnum og beinanvegin fara undir oljuvinnu í Føroyum, so eri eg bangin fyri, at hetta samfelagið fer at detta sundur og vit fara at merkja afturgongd á øllum økjum í samfelagnum. Tað er einfalt ein spurningur um olju ella kaos sigur Johan Mortensen, stjóri í Marr & Co. og nevndarlimur í Føroya Oljuídnaður.

Hann heldur, at vit eiga at seta heilt nýggj fólk at stýra bæði bankum og vinnulívi heldur enn at lata tey somu halda fram.



*Kjartan Hoydal á fiskivinnustevnu í Havn:*

# Vandi fyri miðsavning

á síðu 3



*Vandi er fyri at skipanin við handilskvotum kann føra til miðsavning av ognarviðurskiftunum í flotanum á fíggjarliga sterkastu eindirnar heldur enn á tær rakstrarbestu. Sosialurin var við á fiskivinnustevnuni í Havn í gjár.*

síða 7 SVERRI ÓLASON Í LOYNIKRÓKIN

*Johan Mortensen, nevndarlimur í Føroya Oljuídnaður:*

# Olja ella kaos



-Taka vit ikki avleiðingarnar av støðuni í samfelagnum og beinanvegin fara undir oljuvinnu í Føroyum, so eri eg bangin fyri, at hetta samfelagið fer at detta sundur og vit fara at merkja stagnastión í øllum liðum í samfelagnum. Tað er einfalt ein spurningur um olju ella kaos. Hetta sigur Johan Mortensen, stjóri í Marr & Co. og nevndarlimur í Føroya Oljuídnaður.

-Tað er mín sannføring, at tað, sum er hent í føroysku bankaverðini nú, eigur at fáa eyguni upp á øllum kvalifiseraðum og ábyrgdarfullum fólki í Føroyum, at nú mugu vit leggja til brots við eini oljuvinnu. Við teimum útlitum, sum eru fara at ganga í minsta lagi fimm ár - í besta føri - tí vit siggja nakran glotta sigur Johan Mortensen.

Hann heldur tí, at fara vit ikki í stundini undir offshore-virksemi í Føroyum, so vil vælferðarsamfelagið vit hava upp bygt detta sundur og tað fer at vera ein stagnation í øllum liðum í samfelagnum.

### Paralellir til New Foundland

Hann vísir á, at tað eru óhugnaliga nógvar líkheitir millum tað, sum hendir í Føroyum í dag og tað, sum hendi í New Foundlandi í 1933, tá alt New Foundland fór á húsagang og parlamentið varð niðurlagt. Tá høvdu teir einki parlamentariskt stýri í samfull 16 ár og livdu uppá ein máta upp á náði av Kanada. Enn tann dag í dag eru teir ikki komnir heilt fyri seg. Nú eftir 30 ára kanningar byrja teir so upp á eina oljuvinnu, sum helst fer at menna samfelagið.

### Stór ábyrgd

-Eg vil póstanda, sigur Johan Mortensen víðari, at tað liggur ein ómetaliga stór ábyrgd á teimum føroysku politikarunum, at teir eisini fáa eyguni upp fyri eini komandi oljuvinnu, og at teir - tá teir fara at umrøða oljuspurningin á tingi um fáar dagar - geva loyvi til seismiskar kanningar longu í ár.

Johan Mortensen vónar, at tað vera kompententir vinnulívsmenn, sum koma at mynda nýggja nevndina í tí nýggja bankanum og menn, sum hava støðutakan til vinnulív sum heild.

### Nýggj fólk

-Tað er eisini sera umráðandi, at vit ikki velja somu fólk, sum hava stýrt bæði vinnulívi og politikki, nú verða atturvald at kovra eitt nú henda nýggja bankan víðari. Tað má bera til at finna onnur fólk, fólk sum koma frá tí praktiska lívinum og ikki fólk, sum bara hava sitið á einum akademiskum skúlabonki.

Johan Mortensen heldur, at nú mugu øll draga eina línu og siggja alvaran í støðuni. Tað er antin ella. Antin fara vit í gongd við oljuvinnuni og vóna, at tað kemur at geva nakað til okkum at liva av, ella vit halda fram við fiskivinnuni sum higartil og so mugu vit gera samfelagið so nógv niður aftur, at vit kunnu liva eftir tí, og tá verður tað eitt ómetaliga spartanskt samfelag. Alt tað, sum vit í dag taka sum eina sjálvfylgju, tað verður tað ikki í framtíðini.

jan


# FOTOKAPPING

Tíðarritið "Forældre & Børn" skipar saman við Konica og "Dansk fotohandlerforening" fyri stórari fotokapping, har øll kunnu vera við.

Einasta treytin er at motivið er eitt ella fleiri børn. Aldurin hevur einki at siga.

Og minst til: Vit døma eftir myndunum - ikki børnunum. Talan er altso ikki um eina vakurleikakapping fyri børn.



## VINNINGAR:

3 tær bestu myndirnar fáa ein gávupakka við hesum innihaldi



- Eitt Konica Big Mini 302 autofokus kamera
- Fimm Konica babyfilmar
- Eitt árs haldaragjald uppá "Forældre & Børn"

Allar myndirnar, ið koma við í blaðið "Forældre & Børn" fáa:

- Eitt Konica eingangs-kamera við 24 myndum og innbygdum blitsi.

Harafturat verður lutakast millum allar innkomnu myndirnar um:



- 50 Konica baby-filmar
- 10 Henzo barna-foto album

Allar myndirnar, ið verða latnar SMS FOTO, verða sýndar fram í A4 ella A3 støddi á torginum í SMS í heyst.

Og hesi stóru kopi av myndunum verða ókeypis latin innsendarunum, tá kappingin er av.

So nú er bara at fara at finna ta bestu myndina fram, útfylla lepan til høgru - og lata alt inni í SMS FOTO í Tórshavn ella senda tað við postinum í seinasta lagi mikudagin 25. august 1993.

## ÁRSINS BARNAMYND

Send okkum ta fittastu ella stuttligastu myndina av tínum deiliga barni - ella kom í handilin við henni - og ver við í kappingini um hópin av spennandi vinningum

Klipp út og send ella tak lepan við, tá tú letur mynd inn til kappingina "Ársins barnamynd"

Navn: ______

Bústaður: ______

Postnr.: ______ Bygd/býur: ______

Barnið/børnini á myndina eita: ______

FOTO

Aldurin á barninum/børnunum: ______

Møg. tekstur til myndina: ______

SMS FOTO

Postboks 1058 - 110 Tórshavn - Tlf. 19820